

*- Fyrstu tíðina eftir at eg var komin heim, upplivdi eg ferð eftir ferð, at fólk ikki kendu meg aftur. Eg heilsaði upp á fólk, men fekk onga reaktión, so tá kundi eg í øllum førum staðfesta, at eg var broyttur, sigur Willy Stampe*
*Mynd: Høgni Thomsen*



*Willy vigaði 132 kilo, tá ið hann vigaði mest, og tað er fyri bara sjey mánaðum síðani*




*Hendan myndin er tikið um tað mundið, tá ið Willy av álvara fór at hugsa um at tapa seg*

við øll, at eg var farin til Holbæk at arbeiða upp á lastbilar, sigur Willy.

– Tað var eitt sindur trupult at halda tað loyniligt, tí fólk sóu einki til mín, og tey spurdu, hvat eg gjørdi, og hvar eg var. Søgur gingu eisini eina tíð um, at eg var farin til Ebeltoft, men eg segði bara, at tað passaði ikki.

## Grátandi í song

Tað var ikki lætt, tá ið avgerðin um tapa seg gjørdist til harðan veruleika á kurdeplinum uttanfyri Ebeltoft, har fólk í hópatali fara fyri at sleppa niður í vekt.

– Fyrstu vikurnar vóru ræðuligar. Eg fór næstan grátandi í song, tí nú kundi eg ikki tað, sum eg var vanur við at gera. Eg var vanur við at eta so skeivan mat og til so skeivar tíðir, at tað var einki skil á mínum kostvanum, og tí var tað ein stór broyting fyri meg, at nú skuldi eg eta seks máltíðir við sunnum mati um dagin og sova um náttina.

– Eg var als ikki vanur við at eta morgunmat, so bara tað var ein stór broyting, og tá ið vit fóru ígjøgnum matarskránna, so fann eg bara breyð, gularót og mjólk, sum eg var vanur við frá gerandisdegnum. Nú var tað liðugt við at hugsa, at "eg eri svangur, eg má hava ein búff".

– Aftan á tríggjar vikur, vildi eg bara sleppa heim. Eg segði,